## DAGSINS MEINING

### Búskapurin batnar?

Vit hoyrdu í frágreiðing frá Landsbankanum, at búskaparstøðan í Føroyum er í betring, eftir einari ávísari stagnatión seinastu tíðina.

Tað er gleðiligt, at tað gongur framá, men týdningarmikið hjá okkum, og ikki minst okkara politikarum, er at skilja hví. Vit eiga at eygleiða væl, hvussu sær út við t.d. til- og fráflytingartølum, og hvussu stabil útflutningstølini eru. Eisini eiga vit at hava eyguni eftir privatari skuld, tá vit søguligani hava sæð, at slík skuld hevur ein óhepnan tendens at enda í landskassanum, um heilt illa vil til, og politikarnir missa tamarhaldið.

Ein partur av búskaparvøkstrinum skyldast, at fólk hava fingið meiri pengar um hendi av bøttum fíggingarmøguleikum. Alivinnan hómar glottar nú, eftir at hava verið nærum einki í nøkur ár. Framhaldandi vøkstur kemur at verða avhengigur av, hvussu henda vinnan kemur at laga seg framyvir. Fiskivinnan hevur verið í tungum sjógvi eina tíð, og hóast onkur glotti er í prísum og rávørunøgd, so er framvegis grund til stúran, um oljuprísurin framhaldandi hækkar, og um ávís fiskasløg svíkja.

Alt í alt er grund til at frøðast um búskapargongdina, men tað er umráðandi, at vit ikki missa fokus á framhaldandi at menna vinnu og útflutningsmøguleikar. Søguligani sæð vita vit, at tað kann ganga ógvuliga skjótt hvønn vegin í hesum samfelagnum, og tí mugu vit handla sum um, at deyðin er í durðinum hvønn dag, tí annars koma vit ongantíð burturúr tí sárbaru støðu, sum tað er, tá man bert hevur eina ella heilt fáar útflutningsvinnur.

Vit kunnu taka ein parallell til Danmarkar í hesum døgum, har flogfenaðsútflutningurin verður hart raktur, tí at sjúka rakar. Um høsnarungaídnaðurin í Danmark hevði líka nógv at siga har, sum alivinnan hevði at siga í Føroyum fyri fáum árum síðani, so hevði verið skrædl. Men av tí, at Danmark er eitt land við einari sera fjøltáttaðari vinnu, so er eingin kreppa. Hetta er ein støða, sum vit mugu stremba framímóti fyri Føroyar. Vit mugu fáa fleiri kurvar at leggja okkara egg í! Og vit eiga nógv góð fólk. KT-vinna, ferðavinna, oljuvinnu, alivinna eru bert nakrar av framtíðar vinnunum, sum kunnu fjøltátta vinnuna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dagstovnurin á Argjum – ein sólskinssøga

Um dagarnar var lesarabræv at síggja, har mamma kærdi seg um, at dagstovnar lata aftur um summarið, og børnini noyðast út á aðrar stovnar, um ikki foreldrini kunnu halda frí samstundis sum stovnurin. Spurt verður, um hetta bara skal góðtakast uttan víðari.

Vit eru nøkur foreldur, ið hava havt børn gangandi á Dagsstovninum á Argjum seinastu 7 árini, ið fegin vilja vísa á ein stovn, ið hevur megnað at loyst uppgávuna at halda opið alt árið. Hetta er ein stovnur, sum ikki bert á hesum øki, men eisini á so nógvum øðrum økjum verður rikin fyrimyndarliga.

Dagstovnurin á Argjum er sjálvsognarstovnur og hevur í mong ár havt opið eisini um summarið. Um várið verða foreldrini biðin at skriva, nær teirra børn skulu halda frí (øll børn skulu halda 4 vikur summarfrí), og síðan verður kabalan løgd eftir hesum, og ein ella tvær stovur eftir tørvi eru opnar, tá fæðst børn eru. Hetta tykist ikki vera nakar trupulleiki hjá stovninum, í øllum førum er tað sera stórt nøgdsemi millum foreldur, at hetta letur seg gera. Tað er ongin ivi um, at aðrir stovnar eisini kunnu fáa hetta at bera til, um viljin er til staðar.

Tá vit nú hava trivið í pennin, fyri at vísa á hvussu hesin stovnur hevur loyst avbjóðingina við summarferiuni, vilja vit fegin nýta høvið at geva stovninum nøkur góð orð afturat við á vegnum.

Glað børn merkir glað foreldur. Á Dagstovninum á Argjum verða stór krøv sett til starvsfólkini um at taka sína uppgávu í álvara, og "trupul" børn verða sæð sum spennandi avbjóðingar. Hesin hugburður frá stovni og starvsfólki ger, at foreldrini merkja, at børnini eru í veruliga góðum hondum og gleðast um heitu móttøkuna, tey fáa hvønn dag tey koma og troyttu og glaðu børnini, vit fáa heim við okkum seinnapartarnar.

Eisini tá tað kemur til mat á stovninum hava leiðsla og starvsfólk á dagstovninum gingið nýggjar leiðir. Børnini í bæði vøggustovu og barnagarði fáa mat hvønn dag, og dentur verður lagdur á, at tað er heilsugóður matur, tey fáa. Hetta er væl at merkja ein skipan, sum verður goldin yvir vanligu játtanina hjá stovninum. Foreldrini sleppa undan at smyrja matpakkar, sum kanska ikki verða etnir, meðan børnini fáa góðan mat, grønmeti og frukt. Okkum vitandi, verður hetta ikki gjørt aðarstaðni – í øllum førum ikki í Tórshavnar Kommunu.

Í sambandi við nógva orðaskifti, ið hevur verið í kjalarvørrinum á PISA-forkanningini, hevur ikki bara skúlin, men eisini barnagarðsøkið verið sett undir lupp og tað eisini við røttum. Nomið hevur verið við týdningin av, at yvirgongdin millum barnagarð og skúla verður javnari, og at børnini verða fyrireikaði til skúlan í barnagarðinum. Eftir hvørja summarfrí verða tey børn á Dagstovninum á Argjum, ið skulu í skúla árið eftir, flutt í eina sokallaða skúlastovu, sum eitt nú hevur til endamáls at fyrireika børnini til skúlan. Har sleppa tey at loysa uppgávur, arbeiða við tølum og bókstavum og at spæla við mennandi leikur, sum svara til teirra aldur. Harumframt skulu tey læra at sita still, at tosa ein og ein, lurta eftir hvørjum øðrum og læra at skilja kollektiv boð. Børnini eru sera glað fyri hesa skipan, sum gevur teimum ein spennandi og avbjóðandi dag. Her er ongin ivi um, at Dagsstovnurin er á rættari leið, tí ein av mongu trupulleikunum í føroyska fólkaskúlanum er, at stórur partur av tíðini hjá lærarum í 1. flokki fer til at læra børnini hesi grundleggjandi viðurskifti.

Vit vilja við hesum vísa á eina, eftir okkara tykki, sólskinssøgu har Dagstovnurin á Argjum til fulnar megnar at skapa ein mennandi og innihaldsríkan gerandisdag fyri børn okkara – eisini tær tríggjar vikurnar um Ólavsøkuleiti.

**Gunvør Balle**
**Esther Dahl**
**Súsanna Sørensen**
**Foreldur at børnum á Dagstovninum á Argjum**

# Flogvøllur útbyggjast í Vágum

**MARJUS DAM**
løgtingsmaður



Nú kom seinasta frágreiðingin um útbygging av flogvøll-inum í Vágum. Í samgonguskjalinum stendur greitt, at flogvøllurin skal útbyggast og nútíðargerast. Meira enn 2 ár eru farin og einar 2-3 frágreiðingar eru gjørdar. Tað undrar viðhvørt, at tað gongur so seint, tá talan er um at gera alneyðugar útbyggingar av okkara flogvølli í Vágum. Tað undrar ikki sørt, at nú frágreiðingin um útbygging av flogvølli í Vágum er liðug, so fer Bjarni Djurholm út við, at ein sokallaður "alternativur flogvøllur" uppá 1800 m skal byggjast, -einaferðmen ongin skal vera bangin. Hvar hesin skal liggja, man ikki vera neyðugt at nevna hjá mær. Tað kunnu tey flestu rokna út. Og sera nógv fólk hava sera nógv at óttast fyri. Eg má sum samgongulimur krevja, at B Djurholm heldur seg til samgonguskjalið og arbeiðir við, sum skjótast at útbyggja flogvøllin í Vágum. Um Bjarni Djurholm vil hava "alternativið" á Glyvursnesi at vera 1800 metrar, so vóni eg, at sami landstyrismaður biður um at fáa flogvøllin í Vágum útbygdan til 1800 metrar Tað er tað, ið átti at verið gjørt nú.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.